HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

Dato: 25. september 2018
Mál: 16/00141-87
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. 37/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin)** (Elprísir til hitapumpur og elbilar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin)**
(Elprísir til hitapumpur og elbilar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012, verður í § 9 sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6.* Landsstýrismanninum verður heimilað at góðkenna, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur sambært BK17 og til elbilar.

1) Munurin millum serliga prísin eftir stk. 6 og hægsta prís fyri kWt eftir prísskránni hjá SEV kann í mesta lagi vera 0,40 kr. umframt meirvirðisgjald.
2) Serligi prísurin eftir stk. 6 kann verða givin fyri nýtslu alt samdøgrið og fyri nýtslu part av samdøgrinum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Sum liður í arbeiðinum at røkka politiska málinum at flyta orkunýtsluna á landi til varandi orkukeldur, verður við hesi lógarbroyting útvegað landsstýrismanninum heimild at góðkenna serligar elprísir fyri elnýtslu til hitapumpur og til elbilar.

Endamálið við lógarbroytingini er eitt av fleiri átøkum at skunda undir umlegging av upphiting og ferðslu á landi frá olju til el. Hetta hevur bæði innlendis og útlendis týdning. Innlendis hevur tað týdning fyri orkuveitingina, at vit í størri mun sjálvi hava ræði á henni, umframt fíggjarliga týdningin og ikki minst at avmarka dálkandi útlátið frá orkunýtsluni. Eisini í mun til altjóða avtalur, sum París sáttmálan og Heimsmálini hjá ST hevur hetta týdning fyri at minka dálking frá orkunýtslu.

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at í minsta lagi helvtin av øllum sethúsum og bygningum skulu hitast við grønari orku í 2025, at allir almennir nýbygningar skulu hitast við grønari orku, og at ætlan skal gerast fyri orkusparing og umlegging í eldri bygningum. Somuleiðis skal eggjast til orkunýtslu úr varandi orkukeldum í ferðslu á landi.

Tað eru um 18.000 oljufýr í Føroyum. Eftir málinum í samgonguskjalinum skulu í minsta lagi 9.000 oljufýr verða skift um við grøna hitaskipan í 2025. Sum er hava umleið 1.000 hús fjarhitaskipan, og umleið 1.000 hús hava hitapumpu til jarðhita ella luft-til-vatn. Sostatt skulu umleið 7.000 hús afturat leggja um til grøna hitaskipan fram til 2025.

Íløgan í grønar hitaskipanir er væl hægri enn í t.d. oljufýringar, men raksturin er bíligari. Fyri at fáa framt skiftið frá olju til el, er neyðugt við átøkum. Løgtingið hevur í mai 2017 samtykt, at meirvirðisgjald kann endurrindast fyri íløgu í hitapumpur og arbeiðsløn til uppseting. Eisini er samtykt at frítaka elbilar fyri mvg og skrásetingargjald. Átøkini eru tíðaravmarkað. Hesi átøk gera tað lættari at fáa sær el grundaða upphiting og elbilar. Væntandi fer hetta at skunda undir orkuskiftið. Fyri at eggja uppaftur meira til skiftið, leggur hetta uppskotið upp til, at eisini raksturin av hitapumpum og elbilum verður bíligari.

Umleggingin til varandi orku má fara fram í tveimum sporum: Framleiðsla og nýtsla av el mugu økjast nøkulunda samstundis, tí bæði sporini eru fyritreytir fyri hvørjum øðrum. Her hóska upphiting og ferðsla sera væl til framleiðslumynstrið við varandi orku: Upphitingin við tað, at størsti tørvurin er um veturin, tá ið eisini mesta framleiðslan av orku er úr vindi og vatni. Elbilarnir, tí teir kunnu løðast, tá mest av varandi orku er tøk – serliga um náttina.

Uppskotið leggur upp til, at serligur prísur, ið er lægri enn vanligi elprísurin, kann ásetast fyri nýtslu til hitapumpur og til elbilar alt samdøgrið ella part av samdøgrinum. Við atliti at tørvinum hjá brúkarum og framleiðsluviðurskiftinum hjá SEV, gevur hetta uppskotið t.d. møguleika til, at serligur prísur verður givin fyri alla nýtslu til hitapumpur og fyri løðing av elbilum um kvøldið og um náttina.

Við tað, at hitapumpur og bilar eru møguligir nýggir kundabólkar í elgeiranum, er grundarlag fyri at prísseta hesar soleiðis, at tað bæði verður meira áhugavert fyri hesar kundabólkar at velja el loysnir og samstundis eisini til fyrimuns fyri verandi elbrúkarar. Hetta fæst við at hava ein lægri prís, enn vanligi elprísurin annars er, men tó so høgan, at hann er hægri enn framleiðsluprísurin og tí gevur eitt íkast til føstu útreiðslurnar í elgeiranum. Við tað, at hesir nýggju brúkarabólkarnir rinda meira enn framleiðslukostnaðin fyri kWt, verða teir við til at halda prísstøðinum á el yvirhøvur niðri.

Harumframt hevur ein slík umlegging tann fyrimunin, at tess størri elnýtslan verður, tess meiri kann framleiðslan útbyggjast við varandi orkukeldum, so innflutningurin av olju kann minka og harvið útlátið av vakstrarhúsgassum.

Orsøkin til at differentiera elprísirnar, heldur enn at lækka teir fyri allar brúkarabólkar, hevur sum endamál at fáa nýtsluna flutta frá olju og bensini til el.

Teir fyrimunir, ið differentieraðir elprísir metast at hava við sær, sum eru nevndir omanfyri, hava stóran samfelagsligan týdning við m.a. í størri mun at gera okkum sjálvveitandi við orku og minni dálking. Soleiðis er hetta í samsvari við Paríssáttmálan og ST Heimsmálini, at hesi atlit eiga at ganga fram um løgfrøðiligu meginreglurnar um, at virksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum.

Elprísurin hevur bara ávirkan á rakstrarkostnaðin og ikki íløgukostnaðin. Sum nevnt, eru onnur átøk sett í verk at lækka íløgukostnaðin. Um raksturin av hitapumpum verður samanborin við raksturin av oljufýrum, er raksturin av hitapumpu við verandi prísum góðar 8.300 kr. bíligari um árið við eini nýtslu, ið vanliga verður roknað sum nýtslan hjá einum miðal húsarhaldi í húsum, sum ikki eru nýggj.

| | | | Kr. |
|---|---|---|---|
| Oljufýr | 3.000 litrar | 7,463[1)] kr./l | 22.389 |
| Hitapumpa | 8.000 kWt | 1,76[2)] kr./kWt | 14.080 |
| Munur í rakstrarkostnaði við verandi prísum | | | 8.309 |
| Minni árligt gjald við mest loyvdari prísdifferentiering | | | 4.000 |
| Munur við mest loyvdari prísdifferentiering | | | 12.309 |

1) Prísur sambært prísskráunum hjá ávikavist Effo og Magn 24.07.2018.
2) Prísur sambært prísskrá hjá SEV 24.07.2018.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at serligi elprísurin fyri kWt kann verða í mesta lagi 0,40 kr. + mvg ella tilsamans 0,50 kr. lægri enn galdandi prísur. Við eini nýtslu á 8.000 kWt, verður sparingin í mesta lagi 4.000 kr., so árliga orkunýtslan verður umleið 12.300 kr. bíligari enn raksturin av oljufýri.

Elbilar hava ikki tørv á at løðast gjøgnum allan dagin, men kunnu setast at løða um náttina og virka sum orkugoymsla fyri el, ið verður framleitt um náttina, men brúkt seinni. Fyri elframleiðsluna hevur hetta tann fyrimun, at hon kann javnast betur yvir samdøgrið, so trýstið á skipanina verður minni um dagin.

Við eini koyring á 15.000 kilometrar um árið, brúkar ein elbilur umleið 4.000 kWt, meðan ein bensinbilur brúkar umleið 1.000 litrar av bensini, um hann koyrir 15 km/l. Orkunýtslan í einum elbili er tá góðar 3.200 kr. bíligari um árið sammett við ein bensinbil.

| | | | Kr. |
|---|---|---|---|
| Bensinbilur | 1.000[1)] litrar | 10,29[2)] kr./l | 10.290 |
| Elbilur | 4.000 kWt | 1,76[3)] kr./kWt | 7.040 |
| Munur í rakstrarkostnaði við verandi prísum | | | 3.250 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Minni árligt gjald við mest loyvdari prísdifferentiering | | | 2.000 |
| Munur við mest loyvdari prísdifferentiering | | | 5.250 |

1) 15 km/l
2) Prísur sambært prísskráunum hjá ávikavist Effo og Magn 24.07.2018.
3) Prísur sambært prísskrá hjá SEV 24.07.2018.

Verður prísdifferentieringin 50 oyru/kWt, lækkar útreiðslan 2.000 kr., so samlaða orkunýtslan til elbilar verður umleið 5.200 kr. bíligari enn til bensinbilar.

Tá elskipanin í einum húsum verður víðkað, sum í hesum føri við hitaskipan og elbili og møguliga eisini sólorkuskipan, má hon tillagast nýggju brúkseindirnar, og hevur tað ein kostnað við sær fyri brúkaran. Tað er uttan mun til prísdifferentiering av elnýtsluni ella ikki.

Skal elnýtslan til hitapumpu og elbil koma undir prísskipanina, sum her verður skotin upp, er neyðugt at tryggja, at nýtslan til hesi endamálini verður hildin fyri seg. Tann nýtslan verður tí máld á elmátarum fyri seg. Meirútreiðslan hjá brúkaranum fyri mátararammu, kaðal og montering er eitt mál millum brúkaran og installatørin, men eitt boð er millum tvey og fimm túsund krónur fyri tilfar og arbeiðsløn fyri hvørja eind. Prísurin er m.a. tengdur at, hvussu eindirnar eru staðsettar í mun til hvørja aðra. Umframt henda kostnaðin skal leigugjald rindast fyri mátaran. Hetta verður ætlandi umleið 70 kr. um árið.

Við hesi ætlaðu tillagingini í prísskipanini verða hitapumpur og elbilar meira javnsett við aðrar upphitingarskipanir og bilar, ið kunnu sigast at hava aðrar fyrimunir: Eitt nú eru oljufýr bíligari at keypa enn hitapumpur. Fjarhitafelagið rindar ikki fyri orkuna frá Brennistøðini á Hjalla og Sundsverkinum. Elbilar eru enn heldur dýrari enn vanligu bilarnir.

## Hoyring

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá

- Fíggjarmálaráðnum
- Effo
- Vinnuhúsinum
- Magn
- Kommunufelagnum
- SEV

Harumframt hevur Vilhjálmur Nielsen, Postdoc, Ph.D., Civ.Ing, sent inn viðmerkingar

Hoyringarsvarini endurgivin niðanfyri við viðmerkingum frá Heilsu- og innlendismálaráðnum (HIMR):

**Fìggjarmálaráðið**

“Við uppskotinum fáa tey, ið nýta góðkendar hitapumpur og elbilar, ein fíggjarligan fyrimun við bíligari streymprísi frá SEV. Uppskotið eigur tí at hava bæði fíggjarligar og umhvørvisligar avleiðingar, men hetta er ikki serliga væl lýst í serligu viðmerkingunum til uppskotið. Serligu viðmerkingarnar eiga tí at vera meira útgreinaðar og upplýsandi hesum viðvíkjandi.

*Viðmerking frá HIMR: Tikið til eftirtektar soleiðis, at avleiðingar verða lýstar í mun til, hvat tær møguliga kunnu fara at verða. Uppskotið áleggur ikki, at ymiskir prísir skulu verða fyri hitapumpur og elbilar, men gevur landsstýrismanninum heimild at góðkenna slíkar, um umbøn kemur um tað frá SEV.*

Í uppskotinum er ásett, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur, men tað er ikki nærri tilskilað, hvat góðkend hitapumpa ítøkiliga merkir. Tað eigur at vera greitt ásett í uppskotinum hvat ein góðkend hitapumpa í hesum føri merkir.

*Viðmerking frá HIMR: Tikið til eftirtektar og upplýst, at bygningskunngerðin 2017 (BK17) ásetir, hvørjar hitapumpur eru góðkendar.*

Um SEV skal geva einstøku brúkarunum ein serligan prís til elnýtslu til góðkendar hitapumpur og elbilar, má SEV eisini í hvørjum einstøkum føri vita, at streymnýtslan fer til góðkendar hitapumpur og elbilar. Hvussu kann SEV vita, um streymnýtslan fer til eina góðkenda hitapumpu, ella um tað er ein elbilur, dustsúgvari, køliskáp ella okkurt annað eltól, sum stendur í stungudósini hjá brúkarunum. Tað framgongur ikki av uppskotinum, hvussu hesi viðurskifti skulu umsitast.”

*Viðmerking frá HIMR: Nýtslan til ávikavist hitapumpur og elbilar verður máld á serstøkum elmálarum.*

**Effo**

“Hetta uppskotið er stórt sæð tað sama, sum lagt varð fyri tingið seinasta vár. Tó er munurin nú, at landsstýrið ætlar at flyta stóran part av framdriftini og umsitingini frá tí almenna til eitt el-framleiðsluvirki – nevniliga SEV.

*Viðmerking frá HIMR: Nú eins og fyrr er tað sambært elveitingarlógini SEV, ið ásetir elprísirnar og landsstýrismaðurin, ið góðkennir. Hetta uppskotið broytir ikki ta mannagongdina.*

Eftir okkara hugsan má ein logisk avleiðing í øllum førum verða, at SEV við tíðini skal kunna vísa mótvegis tí almenna og Føroya fólki, at ein komandi økt elframleiðsla, sum seljast skal til hitapumpur og elbilar, alla tíðina veruliga er varandi og grøn.

Vísir tað seg ikki at fara at verða soleiðis, hvat ætlar tað almenna tá at gera. Kann tað hugsast, at mann framhaldandi hevði hildið á at gera framíhjárættindi til elbilar og hitapumpur. Tað hevði givið eina beinleiðis ranga mynd.

> *Viðmerking frá HIMR: Skiftið frá partvís oljuframleiddum el til at framleiða alt el úr varandi orkukeldum hendir ikki frá degi til dags. Málið hjá landsstýrinum er, at í 2030 skal øll elframleiðsla grundast á varandi orkukeldur.*

"Effo vísir annars til skriv og skjøl, latin Rættarnevndini í mars 2017. Hesi eru partvís viðløgd.

Í skrivinum verður m.a. ført fram, nú ætlanin beinleiðis er at lóggeva um grøna orku:

- At neyvt eigur at definerast, hvat grøn orka er
- At Føroya fólk eigur at kunnast um samlaðu fíggjarligu ávirkanina av ætlanini
- At meira svávul er í orkuni frá eini el-løðistøð enn í brenniolju frá eini føroyskari bensinstøð
- At $CO_2$ útlátið er tað sama frá einum elbili sum einum vanligum bili

Ført verður fram í almenna rúminum, at ætlaða átakið hjá landsstýrinum er ein íløga uml. 7 mia. kr. Hvussu fer hetta at ávirka kappingarførið.

> *Viðmerking frá HIMR: Enn er ikki lagt fast, hvussu orkuskiftið fer at verða framt, og ber tí ikki til at siga, hvør kostnaðurin verður.*

"Tað undrar eisini, at hetta uppskot kemur fram samstundis, sum Heilsu- og innlendismálaráðið hevur sitandi arbeiðsbólk við undirbólkum, herundir eisini limi frá Vinnuhúsinum, ið skal koma við ítøkiligum ætlanum til ein komandi grønan politikk. Vinnuhúsið hevur ført fram, at tað m.a. er alneyðugt at gera neyvar fíggjarligar útgreiningar, herundir greina ávirkanina á kappingarførið, áðrenn farið verður víðari.

> *Viðmerking frá HIMR: Mett verður, at hetta lógaruppskotið kann hava jaliga ávirkan á búskapin í elsektorinum og harvið elbrúkararnar við tað, at hesir nýggju brúkarabólkarnir geva positivt fíggjarlig íkast til elsektorin.*

Effo mælir tí enn eina ferð staðiliga til, at hesir faktorar verða væl og virðiliga kannaðir og avkláraðir, áðrenn Løgtingið møguliga skal viðgera eitt lógaruppskot."

**Vinnuhúsið**

"Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað sum útgangsstøði vera positivt, at møguleiki verður fyri at differentiera el-prísin, so tann avlopsorka, sum serliga er um náttina, í størri mun verður gagnnýtt. Um tað eydnast at fáa eina javnari el-nýtslu í samdøgrinum, eru umstøðurnar fyri at gagnnýta varandi orkuna betri enn í dag, og tá til stykkis kemur verður minni tørvur á útbyggingum á framleiðsluni. Tó heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at heimildin átti at verið víðkað, so SEV harumframt fekk heimild at lækka el-prísin til privatu vinnuna, tá avlopsorka er tøk (serliga um náttina).

*Viðmerking frá HIMR: Hvørt aðrar broytingar eisini eiga at verða gjørdar í prísskránni, verður at taka upp við SEV, um landsstýrismaðurin metir, at tað eisini eigur at verða gjørt. Hetta hevur ikki verið viðgjørt.*

Viðmerkingarnar lýsa ikki, hvussu uppskotnu broytingarnar kunnu væntast at ávirka SEV búskaparliga, og harvið elprísin sum heild. Um tað eydnast at fáa umlagt ein part av el-orkuni til um náttina, kann størri partur av avlopsorkuni verða gagnnýttur, og er tað sannlíkt ein fyrimunur fyri SEV. SEV fær eisini eykainntøkur frá elsølu í tann mun, at fólk leggja um frá oljufýri til hitapumpur og frá bensin- og dieselbilum til elbilar. Hinvegin má SEV sannlíkt gera íløgur í framleiðsluna fyri at nøkta økta eftirspurningin eftir streymi. Viðmerkingarnar eiga at lýsa, hvussu hetta kann væntast at ávirka búskapin hjá SEV, fyri harvið at kunna meta um ávirkanina á elprísin."

*Viðmerking frá HIMR: Tá SEV biður landsstýrismannin um góðkenning av elprísum, verður tað altíð viðgjørt í mun til búskapin hjá SEV.*

Samanumtikið tekur FAG sostatt undir við broytingunum, men hetta má ikki hava við sær, at vanligi elprísurin hækkar, men heldur verður eitt amboð hjá SEV at lækka el-prísirnar generelt, so kappingarførið hjá Føroyum betrast."

*Viðmerking frá HIMR: Av tí, at hitapumpur og elbilar eru nýggir brúkarabólkar, ið fara at gjalda meira enn framleiðslukostnaðin fyri nýtsluna, eigur tað at koma búskapinum í elgeiranum til góðar. Víst verður eisini til viðmerkingina omanfyri um mannagongd í sambandi við umbøn frá SEV um góðkenning av elprísum.*

**Magn**

"Uppskotið til broytingar leggur upp til at geva SEV møguleikan at selja bíligari el til tey, sum hava hitapumpur og elbilar, ein avsláttur á upp til 40 oyru umframt mvg, 50 oyru við mvg – fyri hvønn kilowatttíma (kWt). Hetta gevur ein avsláttur á upp til 29 prosent fyri hvønn kWt sammett við tey, sum uttan avsláttur gjalda eftir prísskránni hjá SEV við einari árligari nýtslu á millum 10.000 og 100.000 kWt.

*SEV ræðist kapping*

Á Magn ivast vit ikki í, at hesin avslátturin skal vera agnið, ið skal lokka brúkaran endaliga at stavnsbinda seg til SEV.

Her verður ongin hurð gloppað fyri kapping. Sjálvandi ikki, tí talan er um gjøgnumførda stuðulslóggávu til frama fyri SEV, sum jú ræðist alla kapping.

Kapping um elframleiðsluna og beinleiðis søluna av el til brúkaran er annars lykilin til eina grøna orkuframtíð og ein avgerandi fortreyt fyri, at samgongan skal hava nakran møguleika at røkka sínum gyltu málum á økinum.

Tí má hesin marknaðurin latast upp, áðrenn tað nyttar nakað sum helst at gera átøk, ið skulu stýra brúkaraatferðini.

> *Viðmerking frá HIMR: Spurningurin um kapping á elmarknaðinum fer at verða viðgjørdur í øðrum høpi. Verður hetta uppskotið veruleiki, verður tað ikki mett sum forðing fyri meira kapping. Heldur kann tað saman við øðrum átøkum gera elmarknaðin størri, enn hann er, og soleiðis gera grundarlagið betri fyri, at fleiri kunnu verða partar av marknaðinum.*

*Eru elprísirnir ov høgir*

Knappliga ovurídnið hjá SEV at lata stóran avsláttur í elprísinum styrkir illgrunan um, at interkommunala elfelagið í dag selur streymin alt ov dýrt.

Avsláttarskipanir hjá SEV hava higartil snúð seg um heilt fá oyru fyri hvønn kWt, men nú hevur felagið knappliga ráð at lata 50 oyru, íroknað mvg, í avsláttri fyri hvønn kilowatttíma.

Annaðhvørt eru elprísirnir alt ov høgir í dag, soleiðis at rásarúm er fyri so stórum avsláttri, ella eisini má rokningin fyri avslátturin til hitapumpur og elbilar sendast til hinar elbrúkararnar at gjalda.

Tað er ikki rættvíst, og ein slíkur príspolitikkur rakar eisini sosialt skeivt, tí tað verða ikki tey við teimum lægstu inntøkunum, ið verða tey fyrstu at skifta effektiv oljufýr út við dýrar hitapumpuloysnir og keypa sær dýran elbil fyri at fáa lut í elavsláttrinum.

> *Viðmerking frá HIMR: Væntast kann, at hetta uppskot saman við øðrum átøkum fer at fáa fleiri hitapumpur og elbilar í nýtslu. Verður tað so, fer streymsølan at økjast, og tá brúkararnir gjalda meira fyri hvønn kWt, eisini til hesi endamálini, enn tað kostar at framleiða hann, fer hetta at gera búskapin í elgeiranum betri. Sigast kann, at uppskotið ikki rakar sosialt skeivt, tí ongin elbrúkari skuldi verið verri fyri av hesi orsøk. Heldur tvørtur ímóti. Í tann mun, at henda orkunýtslan flytir frá olju til el, verða tað oljusølufeløgini, ið koma at missa nakað av sínum vinningi, og kemur hann í staðin elgeiranum, t.e. elbrúkarunum til góðar.*

*Jarðhitaloysnir*

Ongin veit við vissu, hvørjar brúkaraloysnir endaliga fara at vinna frama, tá tað snýr seg um upphiting, men nógv bendir tó á, at tað eru hitapumpur, baseraðar á jarðhita, sum eru besta “grøna” alternativið til oljufýr í Føroyum.

Vit skriva “grøna” í gásareygum, tí vit halda ikki, at til ber at tosa um grøna orku, um ikki øll orkuframleiðslan er úr varandi orkukeldum. Tað er føroyska elframleiðslan ikki í dag, tað verður hon ikki í 2025, og tað verður hon heldur ikki í 2030, um ikki íløgur í milliardklassa verða gjørdar næstu árini.

Tað megnar SEV ikki einsamalt, men tað megnar ein orkumarknaður við fríari kapping.

*Frí kapping er loysnin*
Sjálvt um jarðhitaloysnir vinna kappingina við aðrar hitapumpuloysnir í longdini, so eru eisini tær sera dýrar loysnir fyri einstøku húsarhaldini – eisini hóast avsláttur verður latin bæði í elprísinum og til sjálva íløguna við mvg-frítøku ella afturbering.

Sum marknaðurin er í dag og sum hann verður, um hetta uppskotið verður samtykt, so fara oljufýr tí eisini í framtíðini at vinna prískappingina.

Skal prísurin fáast á eitt støði, sum brúkararnir kunnu liva við, er frí kapping á el-marknaðinum einasta amboðið.

Um nýggir orkuveitarar sleppa at kappast bæði innanhýsis og við SEV, so hendir restin av sær sjálvum, og til ber at røkka málunum hjá samgonguni.

Men um hetta lógaruppskot vinnur frama, so útilokar tað í praksis allari kapping, tí framleiðslumonopolið hjá SEV verður tryggjað uppaftur betur, enn tað longu er. Tá fer tað við vissu ikki at eydnast at røkka málunum hjá samgonguni. Í øllum førum ikki, um ynskið ikki er at brúka tvingsil, men at brúkararnir sjálvbodnir fara at velja grønar orkuloysnir frameftir.

> *Viðmerking frá HIMR: Spurningurin um kapping á elmarknaðinum fer at verða viðgjørdur í øðrum høpi. Verður hetta uppskotið veruleiki, verður tað ikki mett sum forðing fyri meira kapping. Heldur kann tað saman við øðrum átøkum gera elmarknaðin størri, enn hann er, og soleiðis gera grundarlagið betri fyri, at fleiri kunnu verða partar av marknaðinum.*

*Magn er partur av loysnini*
Føroyskar orkufyritøkur, eisini Magn, eru til reiðar at bjóða seg fram á einum marknaði, har verulig kapping er um bæði elframleiðsluna og um brúkaraloysnirnar.

Vit eru ein týdningarmikil partur av bestu loysnini og ikki ein forðing.

Tá málið er grøn orka, so mátti tað verið skilagóður politikkur at borið so í bandi, at allir aktørar á orkumarknaðinum kappast um grøna orkuveiting, heldur enn at halda eitt nú oljufeløgunum fast á einum marknaði, ið er grundaður á oljuriknar orkuloysnir.

Men í lógarsmíðinum tykist stórur dentur verða lagdur á, at hvørki vit ella aðrir møguligir kappingarneytar hjá SEV skulu sleppa upp í part.

> *Viðmerking frá HIMR: Sama sum omanfyri.*

*Sjálvstøðugt netfelag*
Verulig kapping merkir millum annað, at nýggir elframleiðarar sleppa at selja streym beinleiðis til brúkaran og ikki sum nú bara til SEV, sum síðani selur streymin víðari við vinningi.

Tí má elnetið rakstrarliga skiljast frá restini av SEV, so tað kann virka sum eitt sjálvstøðugt felag, ið umframt at viðlíkahalda og útbyggja netið bert hevur sum uppgávu at flyta streymin, ið aðrir aktørar, SEV íroknað, framleiða og selja beinleiðis til brúkaran.

*Viðmerking frá HIMR: Spurningurin um møguliga at skilja elnetið rakstrarliga frá restini av SEV verður ikki hildin viðkomandi í hesum sambandi.*

*Neyðugar lógarbroytingar*
Verður ein slík kapping á elmarknaðinum, og lógar- og regluverkið snikkað til, so eitt nú jarðhitaloysnir kunnu optimerast, fara hesar eisini at megna kappingina við oljufýrini. Lógarbroytingar eru eitt nú neyðugar fyri at tryggja, at ikki verður neyðugt at bora jørðhol á hvørjum einasta matrikkli, men at til ber at leggja rør tvørtur um matrikkul, so hvør boring kann veita hita til fleiri húsarhald.

Eisini má tað gerast møguligt hjá veitarunum at leiga ella leasa hitapumpur til brúkararnar, soleiðis at hesir sleppa undan hesi stóru íløgu.

Men uttan kapping um bæði elframleiðsluna og brúkaraloysnirnar, hava jarðhitaloysnir ongan møguleika at kappast við oljufýr um prísin. Um ætlanin væl at merkja ikki er at lata stóran almennan stuðul og harvið flyta stóra meirkostnaðin yvir á landskassan.

*Viðmerking frá HIMR: Kappingarstøðan verður ætlandi tikin upp í øðrum høpi.*

*Bilar*
Tá tað snýr seg um bilar, ber als ikki til at staðfesta, at tað verða battaríriknir elbilar, sum fara at vera sjónskastir í "grønu" framtíðina. Tað er eins nógv, ið bendir á, at vetnisbilar fara at vera eitt minst líka gott alternativ, og allarhelst fara framtíðar bilparkirnar at vera ein blandingur av elbilum og vetnisbilum.

Tí er tað alt ov víðgongt longu nú at fara at stýra brúkarunum ímóti ávísum loysnum á hesum marknaðinum.

*Viðmerking frá HIMR: Hetta uppskot verður ikki mett at forða fyri, at vetnisbilar eisini kunnu gerast ein partur av føroysku framtíðar bilparkini.*

*Kostnaðarmikið fyri SEV og landið*
Uppskotið til broytingar í elveitingarlógini fer at kosta SEV nógvan pening í mistum inntøkum, um tað verður samtykt í verandi líki. Og tað fer eisini at kosta landskassanum nógvan pening í mistum mvg-inntøkum.

Í almennu viðmerkingunum til uppskotið stendur, at tað í dag eru 1.000 hitapumpur í Føroyum, og fram til 2025 skulu í minsta lagi 7.000 húsarhald afturat leggja um til upphitan við "grønari" orku, og í visjón 2030 skulu øll hava lagt um.

*Viðmerking frá HIMR: Í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri er ásett, at í 2025 skal í minsta lagi helvtin av upphitingini verða grundað á grønar orkuloysnir, og at í 2030 skal øll elframleiðsla verða grundað á varandi orkukeldur. Nevnt verður ikki, at í 2030 "skulu øll hava lagt um".*

Fyri SEV fer hetta at merkja eina mista árliga inntøku á fýra milliónir krónur beinanvegin, 32 milliónir krónur um árið frá 2025 fram til 2030 og 72 milliónir krónur um árið frá 2030 og frameftir. Somuleiðis fær landskassin minni mvg svarandi til 0,8 milliónir krónur beinavegin, 6,4 milliónir krónur um árið frá 2025 fram til 2030 og eftir tað 14,4 milliónir krónur árliga.

Omanfyri nevndu tøl eru í dagsins krónum og bert fyri upphiting. Taka vit ferðsluna við, so eru tað í dag umleið 22.000 akfør. Um talið á elbilum til dømis verður 5.000 í 2025, fer tað at merkja ein árligan inntøkumiss hjá SEV á 10 milliónir krónur.

> *Viðmerking frá HIMR: Tað er rætt, at landskassin fer at fáa minni inntøkur av ymiskum gjøldum á olju og bensin, tá nýtslan av hesum verður skift um við el. Inntøkurnar hjá landskassanum, ið kunnu verða beinleiðis ávirkaðar av hesum uppskotinum, eru í mesta lagi 10 oyru fyri hvønn kWt, sum er tað, ið meirvirðisgjaldið minkar, um mest loyvdi avslátturin eftir hesum uppskotinum verður latin. Um ein hitapumpa t.d. brúkar 8.000 kWt um árið, svarar tað til 800 kr. í minni inntøku av meirvirðisgjaldi. Fyri ein bil, ið brúkar 4.000 kWt, hevði tað verið 400 kr. í lægri meirvirðisgjaldi.*
>
> *Sum ført fram í aðrari viðmerking omanfyri fer søla av el til upphiting og ferðslu at geva íkast til elgeiran. Tað verða oljusølufeløgini, sum fara at hava minni inntøkur, ikki SEV.*

*Ætlanin er ikki haldgóð*

Við atliti at omanfyri nevnda inntøkumissi hjá SEV og landinum, er tað burtur við at hugsa sær, at ein slík loysn sum tann í uppskotinum hjá heilsu- og innlendismálaráðharranum fer at halda í fleiri ár. Loysnin er einfalt alt ov dýr bæði fyri SEV og fyri landskassan.

Tí duga vit bert at síggja eitt endamál við uppskotinum, nevniliga at framtíðartryggja monopolstøðuna hjá SEV, sama hvør kostnaðurin er.

Eitt annað, sum stingur í eyguni við uppskotinum, er, at tað ber brá av singulerlóggávu til frama fyri ávísar brúkaraloysnir – ávís produkt. Hetta tí úrvalið av bæði hitapumpum og elbilum enn er sera avmarkað, tí í báðum førum er talan um rættiliga nýggjar orkuloysnir á tøkniligum menningarstigi.

Er yvirskipaða politiska ætlanin, at føroyska samfelagið skal flyta seg frá olju og bensini til varandi orkukeldur, so eiga møguligar stuðuls- og afturberingarskipanir at vera tekniskt neutralar. Tað er, at allar orkuloysnir, ið eru grundaðar á varandi orku, verða javnsettar. Lógaruppskotið vil tað øvuta av hesum. Har verða tvær neyvt defineraðar orkuloysnir – hitapumpur og elbilar – pilkaðar burtur úr rúgvuni og krýndar við almennum stuðli, meðan aðrar onki skulu hava.

Í diagramminum yvir avleiðingar av uppskotinum stendur “nei” í øllum teigunum. Hetta er beinleiðis skeivt. Sum nevnt omanfyri fær uppskotið stórar búskaparligar avleiðingar fyri bæði landið og SEV og ikki minni fyri tey, ið ongan ágóða fáa av avsláttrinum.

> *Viðmerking frá HIMR: Viðmerkingin omanfyri um avleiðingar er tikin til eftirtektar soleiðis, at avleiðingar verða lýstar í mun til, hvat tær møguliga kunnu fara at verða. Uppskotið áleggur ikki, at ymiskir prísir skulu verða fyri hitapumpur og elbilar, men*

*gevur landsstýrismanninum heimild at góðkenna slíkar, um uppskot kemur um tað frá SEV.*

*Viðvíkjandi stuðli til aðrar skipanir, fer eisini at verða hugt eftir tí, men tær metingar, sum higartil eru gjørdar, benda týðiliga á, at hitapumpur fara at verða munandi partur av skipanini – tað kann verða bæði til hús og bygningar einsæris, men eisini møguliga, sum partur av fjarhita- ella lokalhitaloysnum.*

*Mett verður, at skal málið náast um, at í minsta lagi helvtin av upphitingini skal grundast á grønar hitaloysnir í 2025, eigur ikki at verða bíðað við at fáa meira ferð á skiftið.*

*Uppskotið er í andsøgn við lógina*

Á Magn meta vit tað vera ivasamt, um Løgtingið yvirhøvur kann fremja uppskotnu broytingar uttan eisini at broyta § 10 í elveitingarlógini. Har er ásett, at ***"Netvirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur."***

Um prísásetingin hjá SEV er í samsvari við hesa áseting í dag, so verður hon tað ikki eftir ætlaða ógvusliga avslátturin, uttan so, at ein stór eykarokning verður send til teir brúkararnar, sum ikki fáa lut í avsláttrinum.

Ein annar máti at rinda rokningina er við sonevndum krossstuðli, har raksturin av sjálvari elframleiðsluni er við til at fíggja netvirksemið. Men tað er ólógligt, so sjálvsagt vænta vit ikki, at tað verður gjørt.

*Viðmerking frá HIMR: Sí omanfyri um, at hesir nýggju brúkarabólkarnir geva positivt fíggjarligt íkast til elgeiran og lættari at fáa netvirksemið at hvíla fíggjarliga í sær sjálvum.*

*Tilmæli*

Magn mælir frá at samtykkja uppskotið, sum tað fyriliggur. Í staðin eigur landsstýrismaðurin beinanvegin at:

1. Byrja eina tilgongd at skilja sundur netvirksemið og elframleiðsluna hjá SEV í sjálvstøðug feløg
2. Byrja eina tilgongd at bøta um møguleikan hjá privatum at framleiða el
3. Gera tað møguligt, at elframleiðarar ímóti einum netgjaldi kunu selja streymin, sum teir sjálvir framleiða, beinleiðis til kundan um elnetið hjá SEV
4. Gera broytingar soleiðis, at góðkend feløg kunnu keypa streym í heilsølu frá SEV og selja hann víðari til sínar kundar
5. Gera broytingar í lógini, so tað er møguligt at leasa ella leiga hitapumpur til hús

*Viðmerking frá HIMR: Sum nevnt omanfyri, fer ætlandi eisini at verða hugt eftir kappingarviðurskiftunum á elmarknaðinum.*

**Tórshavnar Kommuna**

Tá ynski er at stimbra enn meira undir umhvørvisvinarliga orkutøkni, er eisini onnur viðkomandi tøkni, ið ikki er nevnd, og sum TK metir hevði verið áhugaverd at fingið serprís til, og ikki minst fyri at økja úrtøkuna úr grønu ravmagnsframleiðsluni hjá SEV, har tað sum skilst er møguleiki fyri enn betri úrtøku.

Her vil TK serliga vísa á tørvin, at SEV (um henda heimild verður mett neyðug!) kann veita fjarhitakervinum sama grøna serprís, m.a. soleiðis, at ætlanirnar hjá P/F Fjarhitafelagnum at seta upp vatntangar, sum kundu verið hitaðir við ravmagni, somuleiðis kundu fingið ein meiri áhugaverdan prís frá SEV, og somuleiðis sjóhitaskipanir, ið TK longu hevur á tveimum støðum.

Við støði í umhvørvispolitikkinum hjá TK frá 2016 tekur TK undir við, at fokus nú verður sett á spurningin um prís og tilskundan til nýggja og meiri grøna tøkni, men metir samstundis, at spurningurin um verandi prísskipan er viðkomandi, umframt at atlit eisini verða tikin til, í hvønn mun myndugleikar skulu taka eina tøkni fram um aðra."

> *Viðmerking frá HIMR: Viðvíkjandi stuðli til aðrar skipanir, fer eisini at verða hugt at tí. Tær metingar, sum higartil eru gjørdar, benda týðiliga á, at hitapumpur fara at verða munandi partur av skipanini – tað kann verða bæði til hús og bygningar einsæris, men eisini møguliga sum partur av fjarhita- ella lokalhitaloysnum. Sjóhitaskipanir, sum víst verður til, brúka hitapumpur og verða tí eisini fevndar av hesum uppskoti.*

**SEV**

Sev hevur onga viðmerking til uppskotið.

**Vilhjálmur Nielsen** Postdoc, Ph.D., Civ.Ing

"Tað er gleðiligt at síggja, at heimild nú verður til, at SEV kann áseta lægri prísir fyri elveiting til hitapumpur og elbilar, so skundast kann undir umleggingina frá olju til varandi orku.

Eg havi tó hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

- Uppskotið sigur at SEV kann (men ikki skal) áseta ymiskar prísir alt eftir, nær á samdøgrinum orkunýtslan er. Hetta er gott, tí tað gevur møguleika fyri, at t. d. hitapumpuskipanir kunnu gerast við nóg stórum heittvatnstanga til, at hitapumpur kunnu koyra um náttina til upphitingartørv um dagin. Tað hevur týdning, tí tað er elorkutørvurin, tá minsti tørvur er, ið setir markið fyri, hvussu vindorkumegin kann útbyggjast.
- Uppskotið sigur, at serligi lági prísurin kann veitast til 'góðkendar hitapumpur' og elbilar, men tað sæst ikki, hvørki í lógini ella í viðmerkingunum, hvør hevur heimild til at góðkenna hitapumpur, ella eftir hvørjum leiðreglum hesar skulu góðkennast.

*Viðmerking frá HIMR: Tikið til eftirtektar og greitt frá, at bygningskunngerðin frá 2017( BK17) ásetir, hvørjar hitapumpur eru góðkendar at brúka í Føroyum.*

- Umframt virkni, eigur møguleiki at vera fyri, at SEV kann lata part av avsláttrinum verða tengdan at møguleikanum fyri at stýra hitapumpunum, so ikki ov nógvar eru tendraðar í senn. Hetta javnar tørvin á elorku, men krevur eina íløgu í samskiftistøkni og kann tí verða serliga áhugavert hjá størri brúkarum, ið eisini eru mest áhugaverdir hjá SEV at kunna stýra. Ein leistur fyri hesum møguleika fyri stýring kann vera 'Smart Grid Ready' ella betri. Tað kann væntast at meirkostnaðurin fyri hesum minkar í nærum einki í framtíðini, men virðið fyri samfelagið (og SEV) kann vaksa so hvørt, fleiri hitapumpur koma. Tí eigur heimild at gevast til, at partur av avsláttri til hitapumpur og løðing av elbilum kann gerast tengt at møguleikanum hjá SEV at stýra elnýtsluni, um tørvur gerst á hesum."

*Viðmerking frá HIMR: Møguleikin at stýra útvaldum nýtslueindum fer allarhelst at verða ein partur av framtíðar elskipanini. Hetta verður tó ikki gjørt nú. Tá tað verður veruleiki her hjá okkum kann væntast, at tað helst eisini fer at síggjast aftur í prísskránni og ikki verður avmarkað til hitapumpur og elbilar.*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar

Í lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakrar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar, tí lógin sjálv setir ikki nakað tiltak í verk, sum hevur fíggjarligar avleiðingar.

Lógaruppskotið gevur heimild til, at elnýtsla til hitapumpur og til elbilar kann fáa upp til 0,50 kr. lægri prís, enn hægsti prísur eftir prísskránni hjá SEV er fyri hvønn kWt. Her av er meirvirðisgjald 0,10 kr./kWt.

Brúkar ein hitapumpa 8.000 kWt um árið, verður meirvirðisgjaldið 800 kr. lægri eftir hesum uppskoti, um elprísurin verður 0,50 kr/kWt lægri enn hægsti prísur. Málið hjá landsstýrinum er, at í minsta lagi helvtin av upphitingini skal verða grundað á grønar orkuskipanir í 2025 ella umleið 9.000 hús. Fara øll hesi at leggja um til hitapumpu, svarar samlaða minni inntøkan frá meirvirðisgjaldi til 7,2 mió. kr.

Brúkar ein bilur 4.000 kWt um árið, verður meirvirðisgjaldið 400 kr. lægri eftir hesum uppskoti, um elprísurin verður 0,50 kr./kWt lægri enn hægsti prísur. Landsstýrið hevur ikki ásett ávíst mál fyri, hvussu nógvir elbilar skulu verða, men verður t.d. roknað við 22.000 bilum, svarar samlaða minni inntøkan frá meirvirðisgjaldi til 8,8 mió. kr.

Landskassin fær sum er ymisk gjøld í samband við innflutning av brennievni. Í 2016 vóru avgjøldini í samband við brenniolju, bensin og diesel uml 116 mió. kr. og meirvirðisgjald 93 mió. kr. Verður øll upphiting og øll ferðsla flutt frá olju, fella hesar inntøkur burtur yvir eitt áramál. Hinvegin fer landskassin at fáa inntøkur frá elnýtslu. Um samlaða elnýtslan vaksur við 300 GWt og meðalprísurin t.d. verður 1,40 kr/kWt, verða inntøkurnar til landskassan umleið 80-90 mió. kr.

Aðrar inntøkur fara eisini at koma til landskassan í samband við orkuskiftið, sum t.d. skattur av lønarinntøkum í samband við orkuútbyggingar og umlegging av hitaskipanum. Metingar eru ikki gjørdar av hesum.

**Umsitingarligar avleiðingar**

Uppskotið hevur ikki stórvegis umsitingarligar avleiðingar við sær annað enn, at SEV fær størri rásarúm at áseta ymiskar prísir fyri ymiskar kundabólkar, og landsstýrismaðurin hevur góðkennandi myndugleika í mun til prísásetingina.

**Avleiðingar fyri vinnuna**

Lógaruppskotið kann hava við sær, at sølan av olju-/bensini minkar, meðan sølan av el kann væntast at økjast.

**Umhvørvisligar avleiðingar**

Í lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til beinleiðis umhvørvisligar avleiðingar, tí lógin sjálv setir ikki nakað tiltak í verk, sum ávirkar umhvørvið.

Uppskotið væntast at fara at hava jaliga ávirkan á umhvørvið so hvørt, sum varandi orkukeldurnar verða útbygdar og avloysa olju og aðrar jarðrunnar orkukeldur.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Lógaruppskotið hevur ongar ítøkiligar avleiðingar við sær fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, men stuðlar undir, at Føroyar skerja útlátið av veðurlagsgassum, sum vit eisini hava bundið okkum til at gera sambært altjóða veðurlagssáttmálanum, UNFCCC og Heimsmálini hjá ST.

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til millumtjóða sáttmálar.

**Sosialar avleiðingar**

Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur**

Lógaruppskotið leggur heimild til landsstýrismannin at góðkenna serligar elprísir til hitapumpur og til elbilar. Elveitingarlógin ásetir sum er, at landsstýrismaðurin skal góðkenna prísskránna hjá SEV. Hetta verður framhaldandi galdandi.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kap. 3 Serligar viðmerkingar

**Til § 1**

§ 9, stk. 6: Við hesi áseting fær landsstýrismaðurin heimild at góðkenna, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur og til bilar, ið nýta el sum drívmegi.

Tað er SEV, ið ger uppskot til elprísir, og landsstýrismaðurin er góðkenningarmyndugleiki.

Til nr. 1: Munurin millum prísin eftir stk. 6 upp til hægsta prís fyri kWt eftir prísskránni hjá SEV má ikki vera størri enn 0,40 kr./kWt umframt meirvirðisgjald.

Markið á 0,40 kr/kWt er ásett við ymiskum atlitum. Prísurin skal vera áhugaverdur til at ávirka brúkararnar í samsvari við settu orkumálini. Hann skal tó ikki vera lægri enn, at hann eisini gevur eitt ískoyti til felagsútreiðslurnar at reka orkuskipanina umframt framleiðslukostnaðin.

Við góðkendar hitapumpur sambært BK 17 er at skilja hitapumpur, sum eru góðkendar sambært kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017 (BK17), 8.6.4, stk. 2.

Til nr. 2: Serligi prísurin eftir stk. 6 kann verða latin fyri nýtslu alt samdøgrið og fyri nýtslu part av samdøgrinum.

Tað kann hugsast, at serligi prísurin verður latin fyri alt samdøgrið fyri nýtslu til upphiting, tí í Føroyum hava vit oftast brúk fyri upphiting alt samdøgrið. Elbilar hava ikki tørv á at verða løddir allan dagin, men kunnu løðast um kvøldið og um náttina. At nýtslan verður javnað yvir samdøgrið er eisini til fyrimuns fyri orkuskipanina.

**Til § 2**

Áseting um gildiskomu.

Heilsu- og innlendismálaráðið, 25. september 2018

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/Turid Arge
aðalstjóri

**Skjøl:**

1. Javntekstur
2. Fíggjarmálaráðnum
3. Føroya Arbeiðsgevarafelag
4. P/F Effo
5. P/F Magn
6. SEV
7. Tórshavnar Kommunu
8. Vilhjálmi Nielsen